FØROYSK KT-VINNA

Frá heimamarknaði til heimsmarknað

Vakstrarforum

LØGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister's Office

KT-VINNAN MEIRA **ENN TVÍFALDAST**

Føroyar skulu verða ein kt-vakstrardepil og sýnisgluggi fyri altjóða samfelagnum. Sum framkomin pinkutjóð hava Føroyar eyðsýndar fyrimunir, tá ræður um at gera loysnir til stórar og samansettar avbjóðingar. Tað er skjótt frá ætlan til loysn, tí samfelagið er lætt at yvirskoða og stýra.

Fram til 2030 *skal kt-vinnan vaksa úr 2,5% upp í 6% av BTÚ, sum er gott 1 mia. kr., og útflutningurin úr 100 mió. kr. upp í 600 mió. kr.*

Størstu avbjóðingarnar næstu árini rúma eisini størstu møguleikarnar fyri vøkstri og útflutningi.

Sjálvandi skal tað almenna ikki gera av, hvørji øki privata vinnan skal satsa uppá.

Har tað almenna hevur flestu møguleikarnar og mest átrokandi tørvin á nýggjum kt-loysnum, eru eisini ríkir møguleikar hjá kt-vinnuni.

Kt er eitt týdningarmikið amboð at loysa orku- og umhvørvisavbjóðingar, at frígeva heitar hendur til heilsu- og umsorganaruppgávur, gera umsitingina meira munadygga og at lætta um hjá borgarum og vinnu.

Ein týðandi fyritreyt at gagnnýta teir møguleikar, sum Føroyar hava á kt-økinum, er miðvís útbúgving á øllum útbúgvingarstigum.

Átøkini í hesum riti leggja seg serliga upp at fýra av 17 heimsmálunum hjá Sameindu tjóðum.

VAKSTRARMÁL FRAM TIL 2030

MIÓ KR.



VØKSTUR Á **TRYGGARI GRUND**

At økja um útflutning og at skapa vøkstur innanlands skal verða bygt á hesar súlur.

- Miðvíst at menna kt-loysnir til tess at fremja grøna skiftið
- Miðvíst at nøkta vaksandi tørvin fyri heilsu- og borgaratænastum
- At útbúgva fólk til kt-vinnuna og talgildu framtíðina
- Skapa karmar, sum kunnu vera munadyggar fyritreytir fyri kt-vøkstri

Í hesum riti eru uppskot um átøk, sum kunnu gerast innan hesi fýra høvuðsøki.



TILMÆLI UM **GRØNAN VØKSTUR**

Næstu árini fer heimurin at gera risastórar íløgur í grøna skiftið. Føroyar hava valt at leggja seg á odda at minka útlátið av vakstrarhúsgassi við eini helvt næstu 10 árini. Grøna skiftið er tí fremsta tøkniliga satsingarøkið, og kt spælir ein týðandi leiklut.

Smart Green Islands – *Føroyar skulu vera ein depil fyri kt í grøntøkni*

Nýtsla, útlát og umhvørvisdátur skulu mátast og skjalfestast, soleiðis at vit kenna CO_2 útlátið og tey árin, sum veðurlagsbroytingar hava á føroysku natúruna heilt niður í smálutir.

At síggja og skilja mynstur í stórum dátumongdum (datamining) skapar grundarlag fyri nýggjum og øðrvísi umhvørvisloysnum og eggjar til umhvørvisvinarligan atburð, tí atburðurin hjá tí einstaka hevur stóran týdning fyri grøna vøksturin.

Internetið røkkur alla staðni, og vit eiga til fulnar at gagnnýta tól, ið eru knýtt í internetið at stuðla burðardyggum lívsstíli og skynsamari atferð.

Í dag er elframleiðslan treytað av nýtsluni. Við vindorku, sum í framtíðini verður ein avgerandi liður í elframleiðsluni, er tað øvugta galdandi. Vit skulu brúka ella goyma orkuna, tá ið orkan er har. Hetta er, tá ið vindurin blæsur. Elframleiðsla, sum verður grundað á grøna orku, fer tí at krevja nógv meira stýring, t.d. at hita húsið, tá ið nógv er til av grønari orku. Ein av fyritreytunum fyri hesum er kt-tøkni.

Grønur vøkstur

1 GRANSKING OG NÝSKAPAN

Vit hava vælskipað granskingar- og íverksetaraumhvørvi, sum styrkja grøna skiftið, og eru við til at loysa avbjóðingarnar við "fleiri heitum hondum". Kt-menning innan fiski- og alivinnu, har vit longu eru sterk frammanundan, eru eisini týðandi partar.

2 STUÐUL TIL KT-ÚTFLUTNING

Karmar, sum eru til fyrimuns fyri kt-vakstrarfyritøkur, t.d. skattafyrimunir við afturbering av menningarkostnaði og lægri partafelagsskatti, eru settir í verk.

3 UTTANRÍKISTÆNASTAN

Sendistovukervið er gagnnýtt til fulnar at slóða fyri kt-útflutningi.

Hetta stuðlar arbeiðinum, sum fyritøkur gera at marknaðarføra og selja á netinum.

4 KT-ÍLØGUFÍGGING

Tað er ein framfýsin og óheftur kt-íløgugrunnur, sum hevur ræði á í minsta lagi 400 mió. kr., sum skulu stimbra kt-útflutningi.

Kapitalurin kann vera úr grunnum o.til. undir almennum valdi, t.d. Íleggingargrunninum. Eisini kunnu eftirlønargrunnar, aðrir stovnsligir íleggjarar og privat gera íløgur saman við kt-íløgugrunninum.

5 FØRLEIKAR AT SØKJA GRANSKINGARPENGAR

Serkøn fólk eru sett, sum arbeiða burturav at samskipa og søkja um fígging - eisini altjóða - til gransking og nýskapan.

KT VINNAN SUM PARTUR AV SAMLAÐA BÚSKAPINUM

Virðisøking hjá kt-vinnugreinum í mun til samlaðu virðisøkingina. Samanbering við onnur evropeisk lond fyri 2018.



Kelda: Hagstovan

Talvan vísir, at kt-vinnan er einans 2,5% av føroyska búskapinum. Lutfalsliga eru vit næstaftast í Evropa. Føroyska kt-vinnan ivast ikki í, at her er eitt stórt vakstrarpotentiali fyri Føroyar. Okkara landafrøðiliga staðseting er ofta avmarkandi fyri nýggjan ídnað, tí tað krevur, at vit flyta ting fysiskt. Við kt er kravið gott internetsamband og útbúgvið fólk.

TILMÆLI UM KT Í **HEILSU OG BORGARATÆNASTUM**

Gongdin í aldursbýtinum er, at tað vera færri, sum skulu uppihalda fleiri, tí mugu vit brúka tøkni at viga upp fyri minni starvsfólkatilfeingi.

6 SUM LONGST Í EGNUM BÚSTAÐI

Nýggja tøknin hjálpir fólki at búgva longri heima. Kt-tænastur gera, at tað ber til hjá eldri at bíleggja tænastur eftir tørvi.

Eisini minnir tøknin fólki á og leiðbeinir um t.d. heilivág.

Vilja fólk tað, ber til at hava videosamskifti og bera sensorar, so tað ber til at halda eyga við, um fólk eru illa fyri ella t.d. eru dottin. Eisini ber til uttan hóvasták at hava talgilt samband við starvsfólk umvegis skíggja.

7 LÆTTA UM RØKTARUPPGÁVUR

Á ellis- og røktarheimum verða kt-loysnir og intelligent tól brúkt til at lætta um røktar-uppgávur og at geva starvsfólkunum betri umstøður og meira tíð at vera um búfólkini.

8 TALGILDING Í HEILSU- OG FYRIBYRGING

Snildtøknin skapar møgleikar at savna egnar heilsudátur. Heilsuverkið og eldratænasturnar eru førar fyri at móttaka hesar dátur, og á henda hátt seta í verk neyðug tiltøk t.d. fyribyrgjandi viðgerð.

Heilsudátur hjá fólki eru tøkar á Vanganum og geva teimum yvirlit og møguleika fyri sjálv-greiðslu.

Á Vanganum kanst tú bíleggja tíð til læknaviðtalu, ambulatoriuviðgerð, tíð til blóðroyndir, røntgen o.tíl..

SUM LONGST Í EGNUM BÚSTAÐI

Tey flestu vilja búgva í egnum bústaði sum longst. Búgva fólk í miðal 10% longur í egnum bústaði, t.e. umleið fýra mánaðir, áðrenn tey fara á ellis- ella røktarheim, verða 60 pláss fleiri tøk á ellis- og røktarheimum.

Fyritreyt fyri, at fólk kunnu búgva longur í egnum bústaði er, at umstøðurnar eru til tað og ikki minst, at tey kenna seg trygg. At búgva í egnum bústaði er ikki altíð tað sama sum at verða verandi í húsunum, sum man býr í. Ofta er betra loysnin at flyta í hús ella íbúð, sum eru bygd og serliga væl innrættað til at klára seg í, tá ið heilsan er farin at bila, ella tá ið neyðugt er at fáa hjálp at megna gerandisdagin.

Nýggj tøkni kann skapa fyritreytir fyri, at tað bæði er tryggari og virðiligari at verða búgvandi heima.

Starvsfólkatilfeingið innan eldrarøkt er avmarkað, og nógv av arbeiðinum er likamliga strævið. Nýggj tøkni skal lætta um hjá starvsfólkunum og bøta um, at starvsfólkatilfeingið verður gagnnýtt so væl, sum til ber.

Í 2020 kostaði eitt røktarpláss brutto 650 túsund. uttan kapitalútreiðslur. Tí er stóra uppgávan hjá landi og kommunum komandi tíðina at ganga undan at byggja hóskandi bústaðir til fólk at keypa og flyta í, har kt og tøkni eru týðandi partar.

Tá ið nýggj røktarheim verða bygd ella umbygd, eigur tøkni at verða hugsað inn í allar tilgongdir. Kapitalkostnaðurin av einum røktarheimsplássi er minni enn 10% av hvat eitt røktarheimspláss kostar at reka. Tí er tað góður búskapur at hugsa fysisku karmarnar av nýggjum, um kt og tøkni kunnu minka raksturin við meira enn 10%.

TALUKENNARIN

Skjótt er Føroyski talukennarin klárur at byggja inn í tøkniligar loysnir.

Við miðvísum arbeiði eiga vit at fáa Google, Apple og Amazon at taka føroyska málið inn í teirra loysnir.

Talukennaratøkni skapar aðrar møguleikar at brúka talgild amboð, ikki minst hjá fólki, ið bera brek, og hjá eldri fólki.

At tosa føroyskt við tól er ein fyritreyt fyri at varðveita og menna føroyska málið, sum er kroyst av enskum.

Talgildar borgaratænastur

9 TALGILDAN POSTKASSA TIL ØLL

Borgarar og vinna hava ein talgildan postkassa á Vanganum, sum ger tað lættari og tryggari at samskifta.

10 TYKISFUNDIR VIÐ MYNDUGLEIKAR

Borgarar og vinna hava møguleika fyri tykisfundum við stovnar og myndugleikar.

11 TALGILDA VAL

Vit kunnu velja talgilt til løgtings-, kommunu- og kirkjuval. Hetta gevur sjófólkum og teimum føroyingum, sum arbeiða uttanlands, høvi at velja, og styrkir fólkaræðið og stimbrar undir vitanarsamfelagið.

12 TALGILDAR BORGARAVENDAR TÆNASTUR

Flestu borgaravendar tænastur eru atkomuligar á Vanganum. Eisini er ein loysn við fulltrú fyri borgarar, sum ikki megna at nýta kt.

13 KT-TÓL SKILJA FØROYSKT

Talukennarin virkar í fleiri føroyskum loysnum. Google, Apple, Microsoft og Amazon skilja føroyskt.

TILMÆLI UM **ÚTBÚGVING**

Størsta forðing fyri vøkstri í kt-vinnuni er vantandi kt-fólk. Tí eru langtíðaríløgur í at útbúgva kt-fólk ein fyritreyt fyri vøkstri í kt-vinnuni. Áhugi fyri kt skal verða kveiktur heilt frá barnsbeini. Kt má inn í allar útbúgvingar, og hægri kt-tykislesnaður eigur at verða skipaður.

Um nakað hevur koronakreppan víst, at tað ber til at sameina siðbundna skúlan við tykisskúlan og fjarundirvísing.

Við at skipa eitt framkomið fjarlestrarumhvørvi í samstarvi við útlendskar lærustovnar fáa vit eins nógvar útbúgvingar í Føroyum sum í størstu londunum, samstundis sum vit skapa bestu karmar fyri gransking, nýskapan og íverksetan.

14 TYKISSKÚLI (VIRTUELLUR SKÚLI)

Skúlin er savnaður í einum miðsavnaðum tykisskúla (virtuellum skúla) á øllum undirvísingarstigum. Tað gevur lærarum úr øllum landinum møguleika at samstarva og t.d. hava felags fyrireikingar- og undirvísingartilfar. Næmingar hava møguleika fyri fjarlestri og fyri bandaðari undirvísing, so teir kunnu leita aftur í undirvísingina.

15 HÆGRI KT-TYKISLESNAÐUR

Setrið hevur fleiri kt-útbúgvingar í samstarvi við útlendskar lærustovnar. Uppgávan hjá Setrinum er at skipa góðar karmar fyri lestrarumhvørvi og at tryggja formligu viðurskiftini um útbúgvingina, upptøku, atgongd til fyrilestrar, prótøkur o.tíl. Lesandi á Setrinum, sum eru knýtt at útlendskum lærustovnum, hava eins gott lestrarumhvørvi, sum vóru tey á "staðnum".

16 KT INN Í ALLAR ÚTBÚGVINGAR

Tað ber til at at taka styttri og miðallangar kt-útbúgvingar í Føroyum. Skúlagongdin hjá kt-lærlingum er í Føroyum.

17 KT-ÚTBÚGVING TIL UMSORGANARARBEIÐI

Fyri at skapa fleiri heitar hendur er skipað ein miðvís undirvísing, sum tekur støði í loysnunum og avbjóðingunum, sum eru verksettar í eldratænastuni.

18 FORRITA Í FÓLKASKÚLANUM

Í læraraútbúgvingini verður stórur dentur lagdur á at menna kt-førleikar.

Í fólkaskúlanum eru kt-førleikar, sum at forrita, ein natúrligur partur av skúlaundirvísingini.

TYKISSKÚLI

Talgildu FabLab verkstovurnar eru góðar fyrimyndir fyri, hvussu fysiskt læruumhvørvi á staðnum og tykisskúlin kunnu skipast í einum umhvørvi, sum kveikir hugin til bæði kt, tøkni, handverk, list, íverkstan og samstarv uttan landamørk.

Í Føroyum eru FabLab sett stovn á Kambsdali og Vági. Hesi eru við í aljtóða FabLab-netverkinum, sum telur 1900 talgildar verkstovur. FabLab hevur felags útbúgvingar, vegleiðing og tilfarslistar, forrit, mannagongdir, tekningar o.tíl.

Ein byrjan at seta ferð á føroyska tykisskúlan er at satsa upp á FabLab, m.a. við at gera FabLab til linjugrein á læraraútbúgvingini.

TALIÐ AV KT-FÓLKUM AVGERÐ, HVUSSU STÓRUR VØKSTURIN Í VINNUNI VERÐUR

Í øllum londum kring okkum vanta kt-fólk. Tað skal tí vera gott at vera kt-fólk í Føroyum. Fyrst og fremst mugu vit útbúgva nóg nógv fólk til kt-vinnuna.

Kt-fólk í % av arbeiðsstyrkini liðað á lond í Evropu



Kelda: Kanningin "Kt-fólk í Føroyum", sum KT-felagið lat gera í 2018, og sum er dagført í 2021.

Meðan 4,3% av arbeiðsfjøldini í EU vóru kt-fólk, arbeiddu einans 2,6% av føroysku arbeiðsfjøldini innan kt.

TILMÆLI UM **YVIRSKIPAÐAR KT-KARMAR**

Sjálvandi kunnu vit skapa vøkstur í kt-vinnuni. Tað krevur, at vit hava vilja at taka felags tøk, at skapa góðar karmar og at beina bygnaðarligar forðingar av vegnum.

Almenni bygnaðurin darvar ofta munadyggari menning, tí almenni geirin er smábýttur, og tað kunnu verða nógvar tvístøður. Fyri at røkka vakstrarmálunum og at menna altjóða samstarv og útflutning er alneyðugt, at tað er greitt, hvør hevur ábyrgdina, og hvør fær heimildina at standa fyri framtíðar kt-menningini. Alt hetta eigur at kjølfestast í ovastu leiðslu samfelagsins.

19 KT-HEILDARÆTLAN

Kt-heildarætlan fyri Føroyar ger greitt, hvørjir karmar og bygnaðarligar tillagingar, skulu gerast.

20 EGGJA KT-FÓLKUM AT FLYTA TIL FØROYAR

Skipanir eru, sum taka væl móti útlendskari arbeiðsmegi. Tað eru góðir møguleikar at finna bústað og barnaansing, eins og tað eru skattligir fyrimunir, sum eggja vælútbúnum kt-fólkum at flyta til Føroyar.

21 STIMBRA PRIVATAR ÍLØGUR Í KT-VINNUNA

Íløgur, sum privat gera í íverksetara-fyritøkur, kunnu dragast frá í skatti.

22 LÓGGÁVA UM TALGILDINGARMYNDUGLEIKA

Talgildingarmyndugleiki er skipaður við lóg. Lógin er fyri allan almenna geiran, sum er land, kommunur og grunnar. Myndugleikin hevur samstørv við tað privata, og tað er ein felags talgild kós fyri landið.

23 P-TALIÐ FRÍTT

Privatar fyritøkur kunnu eisini nýta p-talið sum eintýdda eyðmerking. Hetta ger m.a., at vinnan eisini kann brúka p-talið at knýta í Samleikan, Vangan og Mínboks. Hetta ger alt tryggari og munadyggari.

24 SAMSKIPA KT FYRI LAND OG KOMMUNUR

Land, kommunur og grunnar arbeiða saman um at menna og reka kt-loysnir.

25 LÝSA ÁVIRKAN AV KT Í LÓGARARBEIÐI

Í lógararbeiði verður mett um, hvussu lógin skal umsitast við kt. Endamálið er, at kt-menning og lógararbeiði ganga hond í hond.

26 BROYTA JÁTTANARSKIPAN

Játtanarskipanin er broytt. Kt-menning er eitt játtanarslag á fíggjarlógini. Nú kunnu stovnar avskriva kt-íløgur eins og privatar fyritøkur, so at sparingin, sum íløgan skapar, verður brúkt til at fíggja íløguna.

Kt-verkstovan 8. oktober 2021

Íblásturin til tilmælini í hesum riti stavar í stóran mun frá Kt-verkstovuni, sum varð hildin í Norðurlandahúsinum 8. oktober 2021. Tá vóru 180 fólk úr kt-vinnuni, fiski- og alivinnuni, fíggjarvinnuni, vinnuframaøkinum, almennu fyrisitingini, heilsu- og almannageiranum, mentan, undirvising, ferðavinnu, orku- og umhvørvi og nógv onnur á eini verkstovu, har evnið var, hvussu vit skapa vøkstur í føroysku kt-vinnuni við atliti til øll samfelagsøki. Niðanfyri verða nakrar av høvuðsniðurstøðunum frá verkstovuni endurgivnar.

ALMENT

Vit eru ein væl útbúgvin tjóð og hava royndir at menna góðar og framkomnar kt-loysnir. Vit kunnu vera skjót frá avgerð til íverksetan, men vit gera alt ov lítið burtur úr útflutningi. Tørvur er á einum nýggjum hugburði, har útflutningur altíð verður hugsaður inn í nýggjar loysnir, sum verða mentar.

Hugurin og kunnleikin skal kveikjast tíðliga í barnaskúlanum, og kt skal vera ein natúrligur partur av gerandisdegnum í skúlanum.

MENNING OG ÚTFLUTNINGUR

Tað almenna kann stuðla útflutningi fíggjarliga.

Íverksetaraumhvørvið skal styrkjast við betri kørmum og stimbrandi umhvørvi. Íleggjarar, íverksetaraumhvørvið, Setrið og granskingin skulu samstarva meira.

Kt-talent skulu eggjast at velja Føroyar. Vit skulu skapa fyritreytir, ið munandi økja áhugan fyri fígging frá váðafúsum íleggjarum úr Føroyum og uttanlands.

Partur av inntøkunum frá natúrutilfeinginum skal eyðmerkjast til íløgur í kt-íverksetara-fyritøkur.

GRØNA SKIFTIÐ

Í grønari orkuframleiðslu verður kt ein krumtappur, bæði til at stýra framleiðsluni og eisini nýtsluni hjá brúkaranum, so at hon verður optimal í mun til framleiðsluna.

HEILSA OG BORGARATÆNASTUR

Tøknin skal gera lívið hjá eldri meira virðiligt, liviligt og innihaldsríkt. Tøknin kann hjálpa fólki at búgva longur í egnum bústaði og minka um tørvin á hjálp til m.a. reingerð, innkeyp og persónliga røkt. Kt kann eisini lætta um nógvu tungu røktaruppgávurnar, gera arbeiðið innihaldsríkari hjá heilsu- og umsorganarstarvsfólkum og gera tað meira áhugavert at nema sær útbúgving innan hesi øki.

Tá ið lógir verða gjørdar, skal metast um, hvussu kt kann brúkast á økinum, t.d. hvussu kt kann brúkast at umsita og útinna lógina.

Játtanarskipanin og roknskaparmeginreglurnar eru í dag ein forðing fyri langskygdum effektivum almennum kt-loysnum .

Tað skal vera eins vanligt at hitta myndugleikar á tykisfundum sum á fysiskum fundum.

Tað eigur at verða ment víðari á grundvøllinum, sum er gjørdur við m.a. Vanganum og Samleikanum, og fleiri tænastur skulu leggjast afturat. Somu upplýsingar um virki og borgarar eiga ikki at verða skrásettar fleiri ferðir.

Land og kommunur skulu samstarva og menna loysnir í felag heldur enn hvør sær.

Fleiri privatar tænastur skulu talgildast og gerast partur av Vanganum. Tí má kostnaðurin ikki vera ein forðing fyri at vinnan brúkar Samleikan og Vangan.

Niðurstöður
Hávuðstímaeil og næstu stigini

Kt-vinnan skal vaksa upp í 6% av BTÚ, og útflutningurin skal vaksa úr 100 upp í 600 mió. kr.

Málini byggja á hesar súlur:

- Miðvíst at menna kt-loysnir til tess at fremja grøna skiftið
- Miðvíst at nøkta vaksandi tørvin á heilsu- og borgaratænastum
- At útbúgva fólk til kt-vinnuna og talgildu framtíðina
- Skapa karmar, sum kunnu vera munadyggar fyritreytir fyri kt-vøkstri

Arbeiðið byrjaði á vári 2021, tá ið Vakstrarforum gjørdi av at raðfesta kunningar- og samskiftistøkni sum vakstrarøki.

Løgmaður setti í februar 2021 Vakstrarforum, sum í hálvtannað ár skal arbeiða við møguleikum fyri virðisvøkstri í føroyska samfelagnum. Endamálið er at birta upp undir burðardygga virðisøking í breiðari merking, sum kann betra um og styrkja vælferðina í Føroyum langt inn í framtíðina.

Les meir á
Vakstrarforum.fo